## Bók skrivast um Frelsunarherin í Føroyum

Arbeitt verður við at skriva bók um Frelsunarherin í Føroyum, og verður nú sóknast eftir myndum, ið eru tiknar í samband við ymisk arbeiði og tiltøk. Frelsunarherurin hevur hildið til í Tórshavn og í Vági, og hevur sett dám á gerandisdagin á hesum støðum í mong, mong ár. Nú verður sagt frá Frelsunarherinum í Vági, at tey, ið hava myndir, sum kunnu hugsast at vera nýtiligar í bók um Frelsunarherin í Føroyum, kunnu venda sær til Ben Eli á telefon 588558 ella 373150.



## Tycho Brahe skal kannast

Í meiri enn 400 ár hava gitingar verið um, hvørjum tann danski vísindamaðurin Tycho Brahe doyði av, og nú er ætlanin at gera eina roynd at loysa gátuna. Tycho Brahe er jarðaður í Tyn-kirkjuni í kekkiska høvuðsstaðnum Prag, og myndugleikarnir har hava nú givið kekkiskum og donskum serfrøðingum loyvi til at kanna leivdirnar av honum. Serfrøðingarnir vóna, at teirra kanningar kunnu svara spurningunum, um Tycho Brahe doyði av kyksilvureitran, ella um hann bleiv myrdur, skrivar Politiken. Tycho Brahe doyði í 1601.

# Aksel gleðir seg til at hitta suðuroyingar

**Landsstýrismaðurin í Suðuroy hevur onki ímóti, at verða møttur av kravgongu, tá ið hann kemur til Suðuroyar í morgin at tosa um læknaligu støðuna í oynni**



*Í morgin skal Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, hitta suðuroyingar andlit til andlits í sambandi við læknaligu støðuna í Suðuroy. Hann er fegin fyri hetta høvi og hann fer at á fund við opnum sinni, sigur hann*



KRAVGONGA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er fínt, at suðuroyingar vilja hitta meg og eg havi onki ímóti at fáa eitt prát við teir.

Tað nervar aldeilis ikki Aksel V. Johannesen, landsstýrismann í heilsumálum, at hann fer at verða móttikin við kravgongu, tá ið hann fer til Suðuroyar í morgin at viðgera læknaligu støðuna í oynni.

Hann skal til Suðuroyar í morgin at tosa um støðuna á Suðuroyar Sjúkrahúsi og um kommunulæknaskipanina í oynni.

Somuleiðis hava borgarstjórarnir í oynni biðið um fund við landsstýrismannin og tað umbønini ætlar hann at eftirlíkað, so tað verður eisini fundur við teir.

### Vælkomin at mótmæla

Í sambandi við suðuroyarferðina er boðað frá kravgongu ímóti landsstýrismanninum fyri at fáa hann at ganga nøkrum ynskjum á møti.

- Tað havi eg onki ímóti. Tað eru suðuroyingar vælkomnir til. Eg eri fegin um, at suðuroyingar vilja hitta meg og eg vil eisini fegin tosa við teir, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at hann fer at fortelja kravgongufólkunum og suðuroyingum sum heild, at hann tekur læknaligu støðuna í Suðuroy í størsta álvara og hann fer at fortelja teimum, hvørjar ætlaninir, hann hevur á økinum.

- Eg fari at fortelja suðuroyingum, at tað er avgjørt ongin sum helst ætlan um at niðurlagað Suðuroyar Sjúkrahús, heldur tvørtur ímóti.

### Tryggja læknar í Suðuroy

Aksel V. Johannesen sigur, at á fundunum í morgin fer hann at tosa við kommunulæknarnar, læknarnar á sjúkahúsinum og borgarstjórarnar um, hvussu tað ber til at tryggja, at læknar støðast í Suðuroy, bæði læknar á sjúkrahúsinum og kommunulæknar.

- Tað er høvuðsendamálið við ferðini.

Læknarnir í Suðuroy hava áður sagt fyri Sosialinum, at teir meta, at heilsuverkið í oynni skal hava eina meirjáttan upp á 4,5-5 milliónir afturat til narkosulækna og yngri læknar, tí tað er hetta sum skal til fyri at lætta vaktarbyrðuna hjá kommunulæknunum og bøtaumarbeiðsumstøðurnar hjá serlæknunum.

Aksel V. Johannesen heldur, at kanska ber tað til at gera tað bíligari, tí hann er ikki sannførdur um, at tað er grundarlag fyri at seta narkosulalækna í fult starv í Suðuroy.

- Tað ber til at fáa atgongd til narkosulækna á annan hátt, sigur hann. Í hesum sambandi hevur hann áður sagt, at ætlanin er at seta ein narkosulækna, sum skal hava skyldu at arbeiða á øllum trimum sjúkrahúsunum eftir tørvi.

Sum er hevur landsstýrismaðurin 600.000 krónur til endamálið og hann væntar, at tað verður tórført at tosa um nakra eykajáttan í ár.

- Vit hava lagt eina fíggjarlóg og vit hava fingið greið boð um, at eykajáttanir koma ikki upp á tal.

- Men eg havi ikki læst meg fastan á nakra ávísa loysn. Eg fari á fund við opnum sinni at tosa um, hvørjir møguleikar eru og so taka vit tað haðani frá.

# Suðuroyingar gera seg út til friðarliga kravgongu

**- Vit fara at taka ímóti Aksel V. Johannesen við røðum, sangi og skeltum, men tað skal sjálvandi vera í allari friðarligheit, siga tey, sum fyrireika kravgongu á Tvøroyri í morgin**

KRAVGONGA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hetta skal vera ein friðarlig kravgonga, har vit fara at gera vart við okkara sjónarmið.

Tað staðfestir Rudi Nielsen Bruhn, sum er ein av teimum, sum fyrireikar kravgonguna í morgin í sambandi við, at Aksel V. Johannesen, landstýrismaður í heilsumálum, kemur til Suðuroyar í morgin at viðgera læknaligu støðuna í oynni saman við læknum og leiðslu á sjúkrahúsinum, kommunulæknum og borgarstjórunum í oynni.

Tað er langt síðani, at boðað varð frá kravgongu í sambandi við fundin og í løtuni eru tey í holt við at fyrireika seg til at taka ímóti landsstýrismanninum.

Rudi Nielsen Bruhn sigur, at talan skal avgjørt vera um eina friðarliga kravgongu, men hon vónar at so nógv fólk, sum gjørligt fara at møta, tí talan er um álvarsmál fyri Suðuroy.

Á fundinum verða skelti, røður og sangur og annars tað, sum hoyrir eini kravgongu til.

Hon sigur, at fólk er boðsend at møta á sjúkrahús økinum klokkan 11 í morgin og so fer Eyðun Nolsøe at spæla ímeðan bíðað verður eftir landsstýrismanninum, sum kemur við Smyrli klokkan 11.30.

Tey eru í løtuni í ferð við at fyrireika eina røðu fyri landsstýrismanninum og tey eru eisini í ferð við at skera skelti við boðskapinum til landsstýrismannin á.